## Kavin kostar

Í Bretlandi halda búskaparfrøðingar, at tann nógvi kavin, sum hevur órógvað samferðsluna í meginpartinum av landinum teir seinastu dagarnar, kann hava kostað bretska vinnulívinum umleið eina milliard pund. Kavin hevur gjørt, at flogfør, tok og bussar hava staðið still, og at fólk í túsundatali eru ikki sloppin til arbeiðis. Federation of Small Businesses, sum umboðar umleið 200.000 smáar fyritøkur, heldur, at kavin hevur kostað arbeiðsgevarunum 1,2 milliard pund higartil, og at prísurin kann koma upp á 3,5 milliardir pund, um kavin verður liggjandi alla vikuna.



## Hillary fyrst til Asia

Enn hevur amerikanska uttanríkisráðið ikki váttað tíðindini, men sambært vælvitandi diplomatiskum keldum hevur Hillary Clinton, uttanríkisráðharri, valt at fara til Asia á sína fyrstu ferð sum ráðharri. Sambært keldunum skal hon vitja Japan, Suðurkorea og Kina, og sum skilst byrjar ferðin eina ferð í næstu viku. Vanliga plaga amerikanskir uttanríkisráðharrar at vitja Evropa ella Miðeystur fyrst, men her skal havast í huga, at Joe Biden, varaforseti, kemur til Evropa í hesi vikuni, og at serligi sendimaðurin George Mitchell var í Miðeystri í síðstu viku.

# Eftirskúli í Hvalba fyri 90 milliónir projekterast í ár

**Kommunurnar í Suðuroy ætla at taka Løgtingið upp á orðið, so at tað verður klárt at fara undir at byggja skúlan næsta ár**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at fara undir at projektera nógv umrødda eftirskúlan í Hvalba.

Tað er eitt mál, sum kommunurnar í Suðuroy nú fara at taka upp av álvara.

Sostatt fara tær nú at viðgera spurningin um at finna fígging til projekteringina.

Annars hevur Løgtingið sett tvær milliónir av á fíggjarlógini í ár til eftirskúlan í Hvalba.

Men treytin er, at kommunurnar eisini seta tvær milliónir krónur av.

Og kommunurnar í Suðuroy ætla nú at taka Løgtingið upp á orðið.

Fyri stuttum hittust umboð fyri allar kommunurnar í oynni á fundi í Hvalba at viðgera málið um eftirskúlan.

Har samdust tær um, at tað var ikki ráðiligt at venda sær til allar kommunur í Føroyum um at borðreiða við hvør sín parti av teimum tveimum milliónunum, sum kommunurnar skulu útvega til projekteringina.

Tí samdust kommunurnar í Suðuroy um, at tær skulu sjálvar royna at útvega peningin.

Sostatt fara tey sjey bý- og bygdaráðini í Suðuroy á komandi kommunustýrisfundum at viðgera málið fyri at vita um áhugi er fyri at seta peningin av til endamálið.

Ætlanin er, at hvør kommuna skal betala eftir fólkatalinum.

Ætlaði eftirskúlin í Hvalba er mettur at kosta 90 milliónir og har verður pláss fyri einum 80 næmingum.

### Einmælt samtykt

Fyrsta kommuna at viðgera málið, var Porkeri, sum hevði tað á skrá fyri bygdaráðsfundin mánakvøldið.

Har varð einmælt samtykt at taka undir við ætlanini.

Tær ymsu kommunurnar koma at fíggja tær báðar milliónirnar eftir fólkatalinum og parturin hjá Porkeris Kommunu verður sostatt 138.000 krónur, sum bygdaráðið samtykti at seta í ætlanina.

Men hetta er mest sum at rokna sum eitt fyribils innskot til ætlanina, tí tað liggur í kortunum, at tá ið skúlin verður endaliga fíggjaður og bygdur, skal projekteringin teljast upp í samlaða kostnaðin og tá skulu kommunurnar fáa innskotið aftur.

Mett verður, at tá ið Løgtingið hevur sett tvær milliónir av til projekteringina í ár, hevur tað samstundis eisini bundið seg til at fara undir sjálva byggingina, tá ið projekteringin er liðug.

### Viðgera málið í næstum

Hinar kommunurnar fara at taka málið til viðgerðar so hvørt sum tær hava kommunustýrið í teimum hevur fund.

Men tað er nógv, sum talar fyri, at málið verður samtykt, tí í øllum førum higartil hava kommunurnar í Suðuroy verið púra samdar um ætlanina.

Endar hetta við, at allar kommunurnar samtykkja at fíggja hvør sín part part av projekteringini, skulu umboð fyri kommunurnar hittast aftur og so er ætlanin at fara undir pojekteringina sum skjótast.

Projekteringin er mett at kosta millum tríggjar og fýra milliónir og hon tekur eitt ár.

Gongst sum ætlað, verður sostatt klárt at fara undir sjálva byggingina næsta vár.



*Tað er á hesum økinum í Hvalba, ímillum Roynhøllina ovast høgrumegin, og fótbóltsvøllin, at ætlanin er at byggja eftirskúlan. Bygningurin skal ímynda eina langa lon, sum er trýst saman fyri at varðveita so nógva framsíðu, sum gjørligt*

# Hvalbiartunnilin stongdur fleiri vikur afturat

**Seinastu vikurnar hevur Hvalbiartunnilin verið stongdur hvørja nátt og hetta er ein bági, sum tey, sum brúka tunnilin, mugu tola í fleiri vikur afturat**

HVALBIARTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki enn á sinni, at ferðslan aftur sleppur at ganga ótarnað ígjøgnum Hvalbiartunnilin.

Í vetur hevur tunnilin verið stongdur fyri ferðslu um næturnar í fimm vikur tilsamans ímeðan teir hava skrótað.

Vanliga klára teir at skróta einar 100 metrar um vikuna og tað heldur eisini stikk í Hvalbiartunlinum.

Teir eru komnir einar 500 metrar inn og sostatt eru 1000 metrar eftir, sum ætlanin er at taka við jøvnum millumbili, so hvørt sum játtanin strekkir til. Men tað er ikki vist, at alt verður tikið í ár.

Sigurd Lamhauge, sum stendur fyri arbeiðnum sigur, at teir, sum arbeiða í tunlinum, skulu nú í Kalsoy at arbeiða eitt skifti og so koma teir suður aftur.

- Vit fara nágreiniliga um tá ið vit skróta, so vit taka okkum ta tíð, tað tekur, sigur hann.

Higartil hevur bara eitt sjakk verið til arbeiðis, men nú verður umhugsað at seta eitt ella tvey sjakk afturat fyri at seta ferð á arbeiðið, so at ferðslan verður darvað sum minst.

Annars hava fleiri fólk vent sær til Sosialin við søgum frá arbeiðsfólkinum um, at tunnilin er so ótryggur, hann at kalla átti at verðið stongdur.

Men hesum er Sigurd Lamhauge als ikki samdur í.

Hann sigur, at tað er skjótt at semjast um, at Hvalbiartunnilin er ótíðarhóskandi.

Men skrivar ikki undir upp á, at hann er ótryggur.

- Tað rapar ikki grót á vegin og var tunnilin ótryggur, høvdu vit rópt varskó, men tað er ongin orsøk til tað. Tunnilin er avgjørt tryggur og tað er eisini endamálið við skrótingini at taka alt burtur, sum kann hugsast at rapa á vegin.

Eisini Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki avsannar tað.

- Var tunnilin óforsvarligur, høvdu vit stongt hann, so einfalt er tað, sigur Oyvindur Brimnes.



*Arbeitt verður í Hvalbiartunlinum. Nógv grót er skrótað undan loftinum og úr síðunum og rúgvan uttanfyri tunnilin er stór. Fólk, sum hava tosað við arbeiðsfólkið í Hvalbiartunlinum siga, at hann er so ótryggur, at hann næstan eigur at verða stongdur. Men hetta avsanna bæði Sigurd Lamhauge, ið stendur fyri arbeiðnum í tunlinum, og stjórin á Landsverki, staðiliga*